Landssjúkrahúsið



# Til Pápar

## Til pápar, sum verða innlagdir við mammu og barni fyrstu náttina

### Tillukku við barninum!

Eins og mamman, hevur tú sum pápi ein sera týdningarmiklan leiklut í øllum viðurskiftum, sum viðvíkur barninum—bæði tá tað snýr seg um bróstageving og onnur praktisk viðurskifti.

Bróstagevingin er ein felags ábyrgd, og tískil mæla vit til at tú eisini setir teg inn í grundleggjandi vitan/kunning um bróstageving, og hvat skal til fyri at fáa eina væleydnaða bróstageving.



Vit vilja gera okkara til, at tú fært møguleika, at læra barn títt at kenna frá byrjanini, taka tær av grundleggjandi tørvinum hjá barninum, umframt at tú kanst stuðla og verða um mammu og barn. Kanningar vísa, at leikluturin/ vitanin hjá pápanum um júst bróstageving, hevur alstóran týdning fyri, um mamman gevur bróst, hvussu leingi hon gevur bróst og hvussu tað gongur við bróstagevingini í heila tikið. Kanningar vísa, at bróstagevingin eydnast betri, um pápin stuðlar.

Vit fara at bjóða tær at verða innlagdur saman við mammu og barn í eina nátt. Orsaka av, at umstøðurnar á deildini ikki eru tær bestu, vilja vit heita á teg at verða umhugsin

og taka atlit til hini innløgdu á deildini.

## Vælkomin at vitja

Tú ert vælkomin at vitja mammu og barn allan dagin (kl.9-22), og hevur soleiðis møguleika at vera við at ansa barninum, læra tað at kenna o.s.fr. Vit mæla til, at tú ert við til innleggingarsamrøðu, barnavask og aðra vegleiðing, sum vit geva á deildini.

Um fleiri liggja á stovuni, vilja vit heita á tykkum um, at vísa umhugsni fyri hvørjum øðrum. Ynskiligt er, at pápar **ikki** eru á stovunum aftaná kl. 21. Tá er møguleiki at nýta dagligstovuna. Í hvílitímanum millum kl. 13 - 15, mæla vit til, at allir pápar fara út av stovunum og møguliga ansa eftir barninum, meðan mamman hvílir. Nýtið dagligstovuna.



## Ymiskt praktiskt

Morgunin eftir, at tú hevur sovið her, ert tú vælkomin at fáa tær morgunmat á deildini. Døgurði, nátturði og drekka er bert ætlað mammunum. Tú ert vælkomin at keypa tær mat í forhøllini og taka hann við tær á deildina.

## Serligar umstøður

Serlig viðurskifti, so sum sjúka o.a. kunnu gera, at einstakir pápar hava í boði at verða innlagdir í longri tíð saman við mammu og barni.

## Upplatingartíðir hjá Sølubúðini í forhøllini

Gerandisdag kl. 8-20, leygardag kl. 10-20, sunnudag kl. 14.30 - 20.

Landssjúkrahúsið

Føðideildin

www.lsh.fo